# Mugu vísa umheiminum at vit trúgva uppá eina oljuframtíð



*Thor í Hósvík var sum altíð væl umboðað á oljumessuni í Aberdeen.*

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Ein av føroysku fyritøkunum, sum er við til flest allar oljuráðsstevnur í Aberdeen og Stavanger, er Thor í Hósvík, sum er ein tann føroyska fyritøkan, sum hevur mest virksemi í altjóða oljuvinnu. Thor hevur skip í frálandavinnu kring allan knøttin. –Vit halda tað vera rætt at vera við og vísa umverðini, at vit trúgva uppá eina komandi føroyska oljuvinnu sigur Gunnbjørn Joensen, stjóri á Thor. Hann sigur, at fyri teirra fyritøku hevur kundarøkt sera nógv at siga. Á slíkari messu hitta tey nógvar av kundunum og sjálvandi roynir ein altíð at lofta onkrum nýggjum kunda eisini. Gunnbjørn Joensen sigur annars, at tú verður møttur av bjartskygni alla staðni í hesi vinnuni. Og her tað sjálvandi oljuprísurin, sum er orsøkin men eisini tí, at eftirspurningurin av tænastum er so stórur.

- Vit mugu so bara vóna, at prísirnir halda sær, tí tað skulu høgir oljuprísir til fyri, at tað kann løna seg at leita eftir olju her hjá okkum – og um vit veruliga halda og vóna, at oljan skal vera týðandi partur av okkara framtíðar vinnugrundarlagi.

Sjálvur heldur Gunnbjørn, at tað er rætt at vera við á slíkum messum, og ikki minst, at vit gera hetta í felag.

### Thor kring knøttin

Thor í Hósvík er ein av fyritøkunum her á landi, sum rættiliga hevur megnað at bygt upp eitt virksemi í oljuvinnuni. Hetta er gjørt miðvíst gjøgnum mong ár, og í dag er eftirspurningurin eftir tænastum frá Thor stórur. Hetta tí at fyritøkan arbeiðir sera professionelt, hevur góð fólk og góð skip. Í løtuni umsitur fyritøkan eini 10 til 11 skip í frálandavinnuni. Hesi í í Meksikanska Flógvanum, í Mauritanina, í Svartahavinum og í norska, danska og bretska partinum av Norðsjónum.

Umframt hesi skip eigur fyritøkan eisini tvey fiskiskip umframt at tað eisini er reiðarí hjá størri trolara. Thor er so eisini umboð fyri flestu av seismikkskipunum, sum gera kanningar við Føroyar. Í ár hevur verið nógv at gera og hevur tað gingið uppá stás. Gunnbjørn Joensen vísir á, at útlendsku skipafeløgini hava eisini verið sera væl nøgd við føroysku tænasturnar ikki minst flutningin av fólki við tyrlunum hjá Atlantsflog. Í dag munnu arbeiða eini 130 fólk hjá Thor kring knøttin.



*Magni Arge, formaður í oljuvinnufelagnum, handar fyrsta vinnaranum av lutakasti um ferð og luttøku á Offshore Faroes 2006, Graeme A. Slaven, váttan um, at hann hevði vunnið. Tríggjar ferðir frá Atlantsflog til oljumessur í Føroyum næsta ár vórðu lutaðar burt millum tey vitjandi á básinum*

## Áhugin fyri Føroyum veksur aftur

**Brunnurin, sum Statoil fer at bora inni á landgrunninum næsta ár, verður avgerandi fyri oljutilgongdina**

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

– Eg var glaður fyri, at eg fór til oljumessuna í Aberdeen, hóast man veit, at nógv nýtt er ikki at frætta í løtuni. Ein fær líkasum passað sítt netverk og heilsað uppá fólk, sigur Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum, sum saman við Menningarstovuni var við til at skipa fyri føroyska básinum. Atlantsflog var so eisini partur av føroyska básinum í Aberdeen og nýtti Magni Arge høvi at vitja messuna.

Hann heldur, at tað er ein kveikjandi og vaksandi áhugi fyri Føroyum aftur. Bæði frá oljufeløgum og øðrum, sum eru við á messuni. Hetta er sjálvandi tí, at tað verður eitt ávíst virksemi næsta ár. Og eitt felag sum Chevron hevur latið okkum vita, at teir eru rímuliga áhugaðir at seta okkurt í verk í 2007. Og tað tykist eisini sum at BP fer í gongd aftur annaðhvørt í 2006 ella 07.

- Men alt hetta er øgiliga tengt at, hvussu tað fer at eydnast hjá Statoil komandi ár. Um boringin fer at hepnast hampuligt, og tað verður áhugavert út frá einum jarðfrøðiligum sjónarmiði, so er tað gott. Men verður úrslitið negativt fer tað eisini at vera negativit fyri víðari gongdina. Formaðurin í Oljuvinnufelagnum heldur, at í heila tikið var áhugin fyri Føroyum og leiting her rímuliga positivur.

Boringin hjá Statoil, sum sipað verður til, er ætlandi fyrsti brunnurin, sum nakrantíð verður boraður gjøgnum tjúkkar basaltfláir inni á landgrunninum. Helst er talan um tveir írestandi brunnar fra´1. útbjóðing, sum verða lagdir saman til ein, tann hjá Statoilsamtaki og tann hjá Amerada Hess samtaki.